# Vónleyst at meta um dømingina

**Norski EHF-eygleiðarin, Terje Anthonsen, ið var komin til Føroya at meta um tey bæði føroysku dómarapørini, við tí fyri eyga, at Føroya møguliga aftur fingu eitt altjóða dómarapar, helt tað verða vónleyst at meta um dómararnar, tí at liðini í landsdystunum vóru ov ójøvn**

DÓMARAEYGLEIÐING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Meðan Føroyar og Ísland spældu teir tilsamans fýra landsdystirnar um vikuskiftið, sat ein eldri gráhærdur maður einsamallur við síðuna av dómaraborðinum og skrivaði niður at kalla allatíðina, meðan spælt var. Maðurin við penninum er normaðurin Terje Anthonsen, ið var komin til Føroya fyri evropeiska hondbóltssambandið EHF at meta um tey bæði føroysku dómarapørini, ið dømdu teir fýra dystirnar.

## Umráðandi at Føroyar hava altjóða dómarar

Tá ið vit hittu Terje Anthonsen eftir seinasta dystin sunnukvøldið, segði hann, at enn fór eingin avgerð at verða tikin, um føroyingar fara at fáa eitt altjóða dómarapar.

Tey bæði pørini, ið talan er um, eru brøðurnir Hannis og Uni Wardum, og so teir báðir Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen. Hannis og Uni dømdu kvinnudystin á Eiði og mansdystin í Havn, meðan Eyðun og Andreas dømdu hinar báðar dystirnar.



*Norski dómaraeygleiðarin Terje Anthonsen helt ikki, at dystirnir móti íslendingum kundu nýtast til at meta um dómarapørini bæÝi, tí at ov stórur munur var á føroysku og íslendsku liÝunum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Í teimum báðum dystunum leygardagin var so mikið stórur munur á liðunum, at tað er ógvuliga truplult at meta um dómaraparið. Tað er alneyðugt at síggja, hvussu dómararnir standa seg í jøvnum dystum, har nógv stendur á. Tí kann eg fyri so vítt ikki brúka dystirnar á Eiði til so nógv, segði Terje Anthonsen.

Norski eygleiðarin helt eisini, at munurin var stórur á liðunum báðum í kvinnudystinum á Hálsi, og hann helt enntá skemtandi fyri, at hann kundi dømt dystin umvegis eina telefon, um tað skuldi verið.

Tó helt Terje Anthonsen, at mansdysturin í Havn, sum Hannis og Uni Wardum dømdu, kundi nýtast til at meta um dómaraparið, men tó var tað ikki nóg mikið til, at nøkur avgerð verður tikin enn.

- Eg haldi, at tað er neyðugt at síggja hesi bæði pørini døma tættari dystir. Men eg vil tó fegin undirstrika, at eg haldi tað verða umráðandi, at Føroyar aftur fáa eitt altjóða dómarapar í hondbólti, tí tað hevur nógv at siga fyri allar dómarar í Føroyum, segði Terje Anthonsen.

---

Høgni Klein:

# – Vit liggja stillir ov leingi

**Ein av frægastu føroyingunum í dystinum móti Íslandi á Hálsi sunnudagin, var Høgni Klein úr Kyndli, sum serliga í seinna hálvleiki fleiri ferðir snýtti íslendsku verjuna. Hann helt eftir dystin, at dystirnir móti íslendingum vóru eitt gott prógv uppá, at steðgurin í føroyskum hondbólti er ov drúgvur**

LANDSLIÐSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Høgni Klein var annars fegin um, at føroyska liðið hevði reist seg í seinna dystinum móti íslendingum eftir eyðmýkjandi tapið á Eiði leygardagin. Sambært Høgna hevði føroyska manningin sett sær fyri, at dysturin sunnudagin ikki skuldi tapast við meiri enn í mesta lagi tíggju málum.

## Sera sterkir íslendingar

Spurdur hvussu tað bar til, at føroyingarnir stóðu seg so mikið væl í seinna dystinum í mun til fyrra dystin, segði Høgni Klein:

- Tað var stórur munur á gejstinum í hesum seinna dystinum í mun til tann fyrra. Vit høvdu eisini sagt við okkum sjálvar, at vit skuldu koma sterkt aftur eftir dystin á Eiði, og lyftið, ið vit høvdu givið um ikki at tapa við fleiri enn tíggju málum, hildu vit eisini, segði Høgni Klein.

Kyndlamaðurin helt tó eisini, at íslendsku mótstøðumenninir vóru sera sterkir, og at tað sást aftur úti á vøllinum, at teirra kapping júst var komin at enda, meðan tann føroyska var liðug fyri tveimum mánaðum síðani.

- Tú sært, hvussu nógv skot, ið vit hava, sum ikki raka málið. Tað er einki at ivast í, at vóru vit í dystarvenjing, so høvdu vit staðið okkum betur, tí tá høvdu skotini sitið betur, segði Høgni Klein. Hann segði eisini, at eftir hansara tykki liggur føroyska kappingin still alt ov leingi, og um vit ætla okkum at koma víðari, so er neyðugt, at tað verður bæði vant og spælt longri, tí sum nú er, liggur hondbólturin í Føroyum stillur alt ov leingi.



*Høgni Klein helt eftir dystirnar móti íslendingum, at neyðugt er at stytta um steðgin, sum er um summarið í føroyskum hondbólti.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

PREKVALIFIKATIÓN

## Umbygging av ognum Tingsins, 3. byggistig

**Útbjóðandi myndugleiki**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
Heimasíða:
www.landsverk.fo
Teldupost: lv@lv.fo

Landsverk er ein almennur stovnur undir Vinnumálaráðnum. Sum byggiharri tekur Landsverk sær av almennum byggiuppgávum.

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Arbeiðið verður útboðið sum fakentreprisur í bundnari lisitatión. Útbjóðarin ætlar at heita á uml. 5 tilboðsgevarar í hvørjari entreprisu um at bjóða. Tilboðini verða grundað á forprojekt. Tá sáttmáli er gjørdur, verða arbeiðstakararnir við til at gera høvuðsprojektið liðugt saman við teknisku ráðgevunum.

**Lýsing**
Arbeiðstøkan umfatar umvæling av fyrrverandi telefonverksbygninginum.

**Arbeiðstøkurnar eru:**
1. Timbur & snikkaraarbeiði. Í hesi arbeiðstøku verða eisini betongskering, múrara-, blikksmíð-, stál- og kopararbeiði
2. HVS - arbeiði
3. El - arbeiði

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til:
Landsverk
Postboks 78
FO-100 Tórshavn

Umbønin skal vera Landsverki í hendi í seinasta lagi hósdagin 2. juni 2005

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út 20. juni. Útbjóðingartilfarið verður sent út umleið 15. aug. 2005

**Upplýsingar at nýta til undanførleika**
Umsøkjarar skulu saman við umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:
1. Almenn lýsing av arbeiðstakaranum, so metast kann um neyvu minstuorku bæði á tí fíggjarliga og tekniska økinum
2. Upplýsingar um fyriskipan og bygnað á fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.
3. Váttan ella trúnaðarváttan um, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
4. Avrit av viðkomandi vinnulívstryggingum
5. Upplýsingar um eginogn og javna í rokniskapi, saman við einari váttan av samlaðu søluni hjá fyritøkuni síðstu trý roknskaparárini.
6. Váttan um árliga miðaltalið av fólkum, sum starvast á fyritøkuni.
7. Ummæli frá líknandi uppgávum.
8. Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkum, ið verða knýtt at uppgávuni.
9. Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land